# Nógv ynskja at stuðla

**Stuðulskonsertin til frama fyri føroyskum børnum við krabbameini á Platform í kvøld, fríggjakvøldið, er longu útseld.**

STUÐULKONSERT
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

– Jú tað er rætt, at øll atgongumerkini til konsertina eru seld í forsøluni. Tað er ógvuliga gleðiligt, tí tað merkir at foreldrabólkurin at børnum við krabbameini fær minst 35.000 krónur til uttanlandsferðina, sigur Havgrímur Johannsen, ið umboðar Platform.

Tað er pláss fyri 350 fólkum á Platform til stuðulskonsertina í kvøld, fríggjakvøldið, og fólk hava í stríðum streymi ogna sær atgongumerki.

Tónleikararnir á pálli í kvøld verða Sámal og Ronnie, Hanus G. Johansen, Kári p, Finnur og Ronnie (Páll Finnur Páll), Terji Rasmussen, Martin Joensen og Deja Vu.

Fyrireikararnir av konsertini siga, at vegna plásstrot á Platform verður ikki talan um eina sitikonsert, men fólk mugu sláa seg til tols við at standa og lýða á.




*Stuðulskonsertin á Platform í kvøld er longu útseld*

### Stuðlið eftir midnátt

Hóast stuðulskonsertin longu er útseld, ber til hjá fólki at stuðla tiltakinum á annan hátt. Klokkan 01 fara All That Rain á pallin, og tá verður pláss fyri enn fleiri fólki á Platform.

Peningurin frá atgongumerkjasøluni til dansin við All That Rain fer eisini óskerdur til foreldrabólkin at børnum við krabbameini.

**Skráin á Platform**

Sámal og Ronnie
Hanus G. Johansen
Kári p
Finnur og Ronnie (Páll Finnur Páll)
Terji Rasmussen
Martin Joensen
Deja Vu

# Óvanlig tónleikavitjan í heimsklassa

**Mánadagin komandi fær Tórshavnar Musikkskúli vitjan av violinsnillinginum Alberto Lysy frá Yehudi Menuhin Academi í Sveis**

TÓNLEIKAVITJAN

Tað er tokki til føroysku náttúruna, føroysku fólkasálina og vinskapur við listamannin Eyvindur Mohr, sum hesaferð dregur tey bæði, Alberto Lysy og klaverleikaran Elisabeth Westenholz úr Keypmannahavn til Føroya við eini heldur óvanligari vinargerð frá slíkum kapasitetum – nevniliga eini ókeypis konsert.





*Tað er tokki til føroysku náttúruna, føroysku fólkasálina og vinskapur við listamannin Eyvindur Mohr, sum hesaferð dregur tey bæði, Alberto Lysy og klaverleikaran Elisabeth Westenholz úr Keypmannahavn til Føroya við eini heldur óvanligari vinargerð frá slíkum kapasitetum - nevniliga eini ókeypis konsert*

Konsertin verður í Læraraskúlahøllini týskvøldið 24. august kl. 20.

Alberto Lysy, ið er ættaður úr Buenos Aires í Argentina, er føroyavinur burturav, og nógvir føroyingar kenna hann longu frá vitjanum fyrr sum ein framúrskarandi violinleikara. Orsøkin til hansara tokka til Føroyar kemst av, at Eyvindur Mohr og hann, Alberto Lysy, hittust av tilvild í Rom fyri 32 árum síðani. Vinarlagið millum hesar báðar listarmenninar hevur hildið síðani, og sum frá er liðið hevur hann vitjað fleiri ferðir og havt fleiri konsertir í Føroyum. Alberto Lysy hevur nú ynskt, at konsertin týskvøldið verður hildin sum ein viðurkenning til listarmannin Eyvind Mohr og sum ein gáva frá listarmanninum Alberto Lysy til konsertáhugaðar føroyingar.

Tað verður tann framúrskarandi klaverleikarin, Elisabeth Westenholz, sum hesaferð leikar saman við Alberto Lysy. Hon er fødd í 1942 og útbúgvin hjá Arne Skjold Rasmussen við Det Kgl. Danske Musikkonservatorium við eftirútbúgving í Wien hjá Alfred Brendel. Síðani Elisabeth Westenholz hevði sína fyrstu framførslu í 1968, hevur hon verið nógv eftirspurd sum klaverleikari til konsertir, bæði sum sololeikari og sum kamartónleikari. Hon hevur havt konsertir um alt Evropa.

Skráin týskvøldið byrjar við sonatu í A-dur eftir Johan Sebastian Bach og heldur fram við eini sonatu eftir belgiska komponistin Guillaume Lekeu, sum hóast hann doyði ungur, bert 24 ára gamal, náddi at skriva stórfingin seinromantisk verk. Tað, ið eftir er av skránni, verður ognað føðilandinum hjá Alberto Lysy sjálvum, og skráin endar við tveimum tango, sum solisturin sjálvur hevur komponerað.

Tórshavnar Býráð hevur saman við Tórshavnar Musikkskúla fyrireikað konsertina.

IVECO DAILY 35S12V
STÓRUR OG RÚMLIGUR VØRUBILUR



AKSELAVSTANDUR 3300 MM · TOTALVEKT 3500 KG
VØRURÚMIÐ RÚMAR 12 M3 (H: 190 X L: 352 X B:180)

ÚTGERÐ:
LUKSUS FØRARASETUR · ELRÚTAR/SPEGL
FARTPILOT · TOKULYKTIR · MOTORHITARA VIÐ TIMARA
FJARSTÝRT SENTRALLÁS · FØRARA ARMLEN O.A.

BILURIN ER Á GOYMSLU, OG KANN ROYNDARKOYRAST

PRÍSUR: 288.850,-

REYNI SERVICE P/F
Bilasølan - Vegurin Langi - 188 Hoyvík - Tel. 353040

P/F ALMA
Maskinverkstaður & Smiðja
CATERPILLAR
Entreprenørmaskinur við fígging



Á hjalla 15 · Boks 1338 · 110 Tórshavn · tel 31 58 90 · fax 31 04 68 · jan@alma.fo



# Raðfestið rætt

**Bjørn Lomborg mælir politiska myndugleikanum at raðfesta rætt, tá framtíðar orku- og umhvørvispolitikkurin skal orðast. -Spyrt tú meg, eiga vit lata fleiri pengar til eitt nú Aids og fátækadømi, tí á teimum økjunum verða pengarnar betri gagnnýttir enn á umhvørvisøkinum, sigur Bjørn Lomborg.**

LOMBORG VITJAR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

– Raðfestið rætt

Hetta er einfaldi og greiði boðskapurin hjá umstrídda dananum, Bjørn Lomborg til politiska myndugleikan í Føroyum, tá ein framtíðar føroyskur orku- og umhvørvispolitikkur skal orðast. Á tíðindafundi fríggjamorgunin greiddi danin frá sínum høvuðssjónarmiðjum innan orku- og umhvørvisøkið.

Sjónarmiðini hjá Bjørn Lomborg hava fingið øði í mong umhvørvisverndarfólk, tí danin tvíheldur um, at støðan hjá umhvørvinum ikki er so hættislig, sum mong vilja vera við.

Í bólkini, Verdens Sande Tilstande, rør Bjørn Lomborg framm undir, at politisku myndugleikarnar kring heimin eiga at raðfesta peningin til onnur meir átrokandi øki enn eitt nú umhvørvið.

– Á ráðstevnuni Copenhagen Consensus í mai mánað kom millum annað undan kavi, at øki sum Hiv/Aids og Malaria hava størri tørv á bráðfeingis hjálp enn eitt nú dálking, og tí mugu vit seta okkum spurningin, hvussu vit skilabest nýta okkara pening, sigur Bjørn Lomborg

### Gransking

Umstríddi danin ásannar, at fleiri álvarsamir trupulleikar fara at stinga seg upp á umhvørvisøkinum komandi árini, um politisku stjórnirnar kring heimin ikki leggja á annan bógv.

– Fleiri av trupulleikunum á umhvørvisøkinum gerast kortini ikki átroðkandi fyrr enn um 50 til 100 ár. Hesar trupulleikar kunnu vit loysa við at seta fleiri pengar í umhvørvisgransking og menning. Spyrt tú meg, eiga vit lata fleiri pengar til eitt nú Aids og fátækadømi, tí á teimum økjunum verða pengarnar betri gagnnýttir í løtuni enn á umhvørvisøkinum, heldur Bjørn Lomborg.

### Hugsa nationalt

Á tíðindafundinum vísti Bjørn Lomborg á, at tað er ein sannroynd, at viljin hjá ymisku stjórnunum kring heimin til at seta pening av globalar trupulleikar sum fátækadømi og dálking er sera lítil. Hann nevndi eitt nú Danmark, har 99% av BTÚ verður nýtt til sonevnd national endamál, meðan bert eitt prosent er sett av til altjóða endamál.

– Vit menniskju eru einaferð soleiðis háttaði, at vit hugsa fyrst og fremst um okkara egna. Heldur enn at bjarga 1000 fólkum í Etiopia velja vit at bjarga einum fólki á okkara egnu sjúkrahúsum. Tá tú ikki ert sinnaður at nýta meir enn 1% til globalu trupulleikarnar, er tað alneyðugt, at tað eina prosenti verður gagnnýtt skilagott.

Í blaðnum týsdagin verður meir at frætta frá fyrilestrinum hjá Bjørn Lomborg í Norðurlandahúsinum seinnapartin fríggjadagin.



*– Vit menniskju eru einaferð soleiðis háttaði, at vit hugsa fyrst og fremst um okkara egna. Heldur enn at bjarga 1000 fólkum í Etiopia velja vit at bjarga einum fólki á okkara egnu sjúkrahúsum*

*Mynd Álvur Haraldsen*

Nú kanst tú søkja um
Stuðul til gransking, menning og nýskapan

Í ár eru økini "Matur" og "Fólkaheilsa" raðfest, soleiðis at verkætlanir innan hesi øki hava serligan fyrimun.

**Stuðul verður latin:**
- føroyskum granskarum og granskaralesandi
- gransking, menning og nýskapan á ella í tilknýti til føroyskar granskingarstovnar og vinnufyritøkur
- gransking, menning og nýskapan, ið hava týdning í føroyskum høpi.

**Stuðul verður latin til ymisk sløg av verkætlanum:**
- smærri verkætlanir við styttri tíðarætlan
- post grad. ella post doc. verkætlanir, ið ganga um fleiri ár
- ph.d.-verkætlanir.

**Tað er ein fyrimunur, at:**
- verkætlanin fevnir um samstarv millum fleiri granskarar
- verkætlanin fevnir um samstarv millum granskarar, granskingarumhvørvi og vinnuna
- umsøkjari fær stuðul aðrastaðni eisini.

Umsóknir skula skrivast á serligt oyðublað, ið fæst á skrivstovu ráðsins og á heimasíðuni, www.gransking.fo.

Nærri frágreiðing um raðfestu økini og skrivlig vegleiðing fæst á somu støðum.

**Umsóknarfreist er:**
1. september 2004, kl. 12.00

**Hugsjón**

**Vit vilja**
- at gransking í Føroyum skal vera á altjóða stigi
- birta upp undir menning og nýskapan
- leggja dent á øki, har vit hava tilfeingi at gera rannsóknir
- at fremsti førleiki og vitan um land og fólk skal finnast í Føroyum

**Vit eru sannførd um**
- at gransking, menning og nýskapan eru avgerandi liðir í at brynja okkum til avbjóðingarnar í einum heimi í støðugari broyting

**Vit ynskja**
- dyggari grundarlag fyri avgerðum
- betri tillagingarførleika í altjóðageringini
- betri kunnleika til burðardygga umsiting av náttúrutilfeingi
- størri virði í føroyskari framleiðslu og útflutningi
- hægri vitan og tilvitan um mentan og samfelag

**Grundstøðið er**
- at grundgransking er neyðug fyri at fáa til vegar vitan til gagn fyri samfelagið
- at nýtt gransking mennir vinnulív og samfelagstænastur
- at samstarv og samskipan eru fyritreytir fyri nyttuvirði av gransking, menning og nýskapan

SANSIR TEL 355 355

**Granskingarráðið hevur tvey høvuðsarbeiðsøki**
- at ráðgeva landsstýri og vinnu í granskingarpolitiskum spurningum.
- at umsita Granskingargrunnin, sum veitir fígging til gransking, menning og nýskapan.

granskingarráðið
THE FAROESE RESEARCH COUNCIL
Granskingarráðið · Bryggjubakki 12 · Postrúm 259 · FO-110 Tórshavn
Tel 31 65 15 · Faks 35 31 01 · www.gransking.fo · gransking@gransking.fo